Winthereig
Journalistikkur

Tórshavn 17. august 2018

Góðan dag!

Í sambandi við sendingina Pressan, sum eg havi nevnt fyri tykkum, at eg skal gera í útvarpinum hjá Kringvarpinum, havi eg hesar ætlanir um tykkara luttøku.

Sendingin verður bygd upp við 1-2 evnum umframt einum panelparti, har eg bjóði tykkum at vera við. Panelparturin viðger í høvuðsheitum evni úr farnu vikuni, sum onkursvegna hava við journalistikk, miðlar ella tíðindaflutning at gera. Vænti at panelparturin varir einar 25-30 minuttir

Tað ber snøgt sagt ikki til at siga, hvørji evnini vera, tí kunnu panelini ikki setast saman eftir evnum, sum verða viðgjørd. Hinvegin vil eg leggja meg eftir at velja evni, sum hóska til luttakararnar. Fyri at hava eitt sindur av planlegging, havi eg gjørt ein lista yvir samansetingina av panelinum tær fyrstu nýggju sendingarnar. Samansetingin er tilvildarlig, tó so at størru miðlarnir eru oftari við.

Eg havi skrivað navnið á miðlinum, tí so kunnu tit sjálvi velja, hvønn tit senda. Í vikuni, tá sendingin er, ber til fáa eina hylling á, hvørji evnini verða, og tað hevur kanska ávirkan á, hvønn tit hava hug at senda at luttaka.
Um eg einki frætti aftur frá tykkum, so vænti eg tit eru við upp á henda frymilin.

Eg skal nokk minna tykkum á í góðari tíð.

Sendingin verður send fríggjamorgun kl. 10 og panelið verður sent beinleiðis.
Her er samansetingin til tær fyrstu 9 sendingarnar:

| **Sendidagur** | **Panelluttakarar frá hesum miðlum:** |
|---|---|
| 07-09-18 | Dimma, Sosialurin, R7 |
| 14-09-18 | Dimma, KvF, Norðlýsið |
| 21-09-18 | Sosialurin, KvF, R7 |
| 28-09-18 | Portalurin, Vágaportalurin, Norðlýsið |
| 05-10-18 | Ting.fo, Dimma, KvF |
| 12-10-18 | Sosialurin, Vágaportalurin, Oyggjatíðindi |
| 19-10-18 | Ting.fo, R7, Norðlýsið |
| 26-10-18 | KvF, Ting.fo, Dimma |
| 02-11-18 | KvF, Sosialurin, Portalurin |

Vinarliga

Øssur Winthereig, journalistur

Øssur Winthereig • undir Heygnum 33 • FO-100 Tórshavn
Tel. +298  21 84 86 • mail: ossur@winthereig.com